**Starvsfólk  til dagstovnin "Kambur", at byrja 10. august 2020.**

Kambur er stovnur, ið veitir heildags tilboð til 6 ára gomul børn og frítíðarskúlabørn.

**Vit sóknast** eftir  námsfrøðingum, ið hava dirvið at seta dagsskránna, bæði fyri tey 6 ára gomlu og frítíðarskúlabørnini.
Vit vænta at tú:

- ert álítandi, tekur ábyrgd og dugir at seta tær mál
- í arbeiðinum hevur umsorgan fyri tí einstaka barninum
- ert jalig/ur
- góð samstarvsevnir, bæði við starvsfelagar og foreldur
- at tú sært møguleikar, sum náttúran bjóðar og brúkar teir í dagliga arbeiðinum
- dámar væl at vera úti/uttandura virksemi

**Vit bjóða** eitt spennandi starv, ið støðugt er í menning, har tú kanst verða við at mynda og seta tín dám á stovnin. "Kambur" liggur í einum náttúruríkum umhvørvi, har ið náttúran náttúrliga setur sín dám á gerandisdagin.

Talan er um:

- 1 starv á 40 tímar ætlað námsfrøðingi.
- 2 størv á 35 tímar ætlað námsfrøðingum.

**Setanarviðurskifti**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.
Arbeiðstíð, mánadag til fríggjadag 07.30 – 17.00.

Um eingin námsfrøðingur søkir verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað.

Skrivlig umsókn skal verða Fuglafjarðar kommunu í hendi í seinasta lagi týsdagin
15. juli 2020 kl. 12.  Eisini ber til at senda teldupost til info@fuglafjordur.fo.

Fuglafjarðar kommuna
Ennivegur 38
Fo-530 Fuglafjørður

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Bjørghild Arnholdtsdóttir, leiðari, telefon 238092